# USA lagt álopsætlanir

Ovastin fyri teimum amerikonsku herdeildunum í Miðeystri váttaði í gjár, at amerikanska hervaldið hevur lagt ætlanir um loftálop á mál í Iran fyri at gera enda á teirri iransku kjarnorkuverkætlanini. David Petraeus, generalur, vildi ikki siga nakað um, nær USA ætlar at fremja álopsætlaninar í verki. Amerikanskir fjølmiðlar hava sagt, at ætlaninar umfata álop við bumbuflogførum og rakettum. Iran hevur brynjað seg ímóti einum álopi við at seta loftferjurakettir við øll kjarnorkustøðini, skrivar Reuters.



# Pakistan meiri víðgongt

Ein nýggj frágreiðing um støðuna í Pakistan kemur til ta niðurstøðu, at landið verður alt meiri islamistiskt í komandi árum. Tað fer millum annað at gera tað truplari hjá USA at fáa pakistanska undirtøku fyri bardaganum við víðgongdar, islamistiskar rørslur sum eitt nú Taleban. Amerikanararnir kunnu so ugga seg við, at sambært frágreiðingini er tað fullkomiliga óhugsandi, at Taleban sleppur fram at valdinum í Pakistan. Hinvegin staðfestir frágreiðingin, at USA og Bretland fara at fáa minni ávirkan á Pakistan tey næstu árini.

# Rimmar konsert í saltsiloini í mai

**Tann 15. mai fara Eivør, Teitur, Frændur, Harkaliðið, Rúni Brattaberg og onnur at hava konsert í saltsiloini á Drelnesi. Hetta varð avdúkað á samkomu í siloini fríggjakvøldið, har Projekt Salt eisini fekk handað peningagávu á 92.756,82 krónur**

MENTAN
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosilurin.fo*



*Fríggjakvøldið handaði Kristian Holbæk Ólavi Rasmussen, samskipara av Saltsilo-projektinum, slakar 93.000 krónur, sum komu inn til jóansøkukonsertina*

Fríggjakvøldið var samkoma í saltsiloini á Drelnesi. Osøkin var,at Suðuroyar Tónleikafelag handaði Projekt Salt 92.756,82 krónur. Hetta var yvirskotið av Jóansøkufestivalinum 09, ið var skipaður sum stuðulskonsert til frama fyri ætlanina at gera saltsiloina til mentanar- og konserthús.

Stóra høllin var upplýst við ljóskastarum og livandi ljósum. Tóra Vestergaard sang Ave Maria, meðan fuglar í niðara enda á siloloftinum eisini sungu. Men Tóra sang yndisliga hetta kenda verk, og so var løtan komin, har Kristian Holbæk, vegna Suðuroyar Tónleikafelag, handaði Projekt Salt peningagávuna. Kristian takkaði tónleikarum úr øllum landinum, ið spældu ókeypis á jóansøku til frama fyri mentanarhús ætlanina.

### Gull verd

Ólavur Rasmussen, samskipari í Projekt Salt, takkaði fyri peningagávuna, og takkaði eisini fyri, at føroyskir tónleikarar síggja møguleikar í ætlanini, og spældu ókeypis á jóansøku. Hann viðgekk, at hendan gávan ikki einsamøll fíggjar ætlanina, men at gávan tó er gull verd, tí hon er prógv um samanhald í Føroyum, har føroyskir tónleikarar stóðu saman um at stuðla ætlanini.

Ólavur Rasmussen vil í viðmerking ikki koma inn á smálutir í Projekt Salt, tí enn verður samráðst, men hann sigur seg tó kunna siga, at tað sær gott út, og at tað røkist fyri, at ætlanin gert veruleiki.

### Takkaði Vígdis Finnbogadóttir

Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri, frøddist um, at fólk úr allari Suðuroynni vóru samankomin í saltsiloini fríggjakvøldið. Hann segði, at tað nú vóru eini 2-3 ár síðani, at Tvøroyrar Býráð skuldi taka støðu til, hvørt siloin skuldi beinast burtur, ella varðveitast. Hann segði seg vóna og vænta, at um eini 2-3 ár ber til at savnast á sama stað í einum mentanar- og konserthúsi. Hann takkaði Suðuroyar Tónleikafelag, føroyskum tónleikarum, Vígdia Finnbogadóttir, ið er protektor fyri mentanarhúsætlanina, og Ólavi Rasmussen sum hann segði alla tíðina hevur verið ein eldsál í arbeiðium at fáa ætlanina til veruleika.

### Stór konsert

Brandur og Tróndur Enni og Eyðun Nolsøe spædu nøkur løg, og síðani kom Ólavur Rasmussen aftur á pall, sum í hesum førinum vóru nakrir plattar, og hann kunngjørdi, at tann 15. mai verður rimmar konsert í saltsiloini.

Bíðað hevur verið eftir, at nøkur nøvn eru tøk og siga ja, og nú er alt komið á pláss. Tann 15. mai fara Eivør Pálsdóttir, Teitur Lassen, Frændur, Harkaliðið, Rúni Brattaberg og Brandur og Tróndur Enni at spæla,og møguliga legst afturat. Hetta verður stuðulskonsert til frama fyri ætlanina at gera saltsiloina til størsta konserthús í Føroyum, og kanska á okkara leiðum yvirhøvur. Sambært samskiparanum røkist fyri, at hetta verður veruleiki.

# Ósketni og gáloysni við trygdini kostaðu føroyskum fiskimanni lívið

**Vanlukkan umborð á danska trolaranum Darwin, sum í august í fjør kostaði einum føroyskum fiskimanni lívið, stóðst av ósketni og gáloysni við trygdini umborð, sigur Sjóferðslustýrið**

VANLUKKA
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Tann 47 ára gamli Magni Olsen av Toftum doyði, tá hann datt niður í lastina á danska ídnaðartrolaranum Darwin í Norðsjónum tann 19. august í fjør. Ein tyrla fór út til skipið eftir manninum og flutti hann á sjúkrahús, men læknarnir kundu bara staðfesta, at maðurin var deyður.

Nú hevur danska Sjóferðslustýrið kannað tilburðin. Í frágreiðingini, sum júst er komin, sigur stýrið, at Magni Olsen hevði verið niðri og reinsað lastina, og at hann eftir øllum at døma hevur mist fótafestið, tá hann var á veg upp aftur á dekkið. Eingin sá, hvat hendi.

Sjóferðslustýrið skrivar í frágreiðingini, at Darwin hevði trygdarútgerð, men at eingin av manningini brúkti hana. Stýrið sigur eisini, at manningin hevði ikki fingið ta neyðugu kunningina um, hvussu trygdarútgerðin skal brúkast, og at hvørki eigarin ella skiparin høvdu vilja ella vitan til at menna ein góðan trygdarhugburð umborð á trolaranum.



*Ídnaðartrolarin "Darwin" er úr Esbjerg, har Magni Olsen eisini búði*

*Mynd: JydskeVestkysten*